## Kongressin segði ja

Amerikanska Kongressin samtykti í nátt ta nýggju heilsutryggingina. Síðani Umboðsmannatingið samtykti lógina seinasta sunnudag, hava republikanararnir roynt at fáa fleiri broytingar í lógina, og í nátt samtykt Kongressin so tað endaliga orðaljóðið. Umboðsmannatingið samtykti lógina við 220 atkvøðum fyri og 207 ímóti. Í Senatinum fekk lógin 56 atkvøður fyri og 43 ímóti. Leiðarin í demokratiska tingbólkinum, Harry Reid, segði aftan á atkvøðugreiðsluna, at hon var endin á einum politiskum dysti, sum fer at standa í teimum amerikonsku søgubókunum.




## Verjir pávan

Vatikanið í Rom roynir av øllum alvi at verja Benedikt páva , sum verður lagdur undir at hava sitið hendur í favn, hóast hann í fleiri ár var vitandi um ein amerikanskan prest, sum hevði gjørt seg kynsliga inn á fleiri børn og ung. Fjølmiðlar í USA skriva, at amerikanski erkabiskupurin kunnaði Vatikanið um málið í 1996. Har bleiv tað latið einari nevnd, sum eftir stutta kanning legði tað til viks. Formaður í nevndini var týski páváráðgevin Joseph Ratzinger, sum í dag eitur Benedikt pávi 16.

# Upsaskip framvegis smáligan fiskiskap

**Upsarokið hjá partrolarunum vardi ov stutt í hesi vertíðini. Skipini høvdu rættiliga rokveiði í nakrar dagar, men síðan minkaði fiskiskapurin aftur. Seinasta vikuskifti royndist hampiliga gott aftur, men síðan er veiðan minkað, og nú hava partrolararnir yvirhøvur smáligan fiskiskap**

*Várið hevur verið eitt sindur undarligt hjá partrolarunum. Í byrjanini av vertíðini var veiðan slakari enn um somu tíð undanfarna ár, men síðan rendu skipini seg í rættiligt upsarok. Tað vardi bara ov stutt, og í løtuni lata upsaskipini illa at*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag eru partrolararnir Rókur og Lerkur í Saltangará við umleið 200.000 pundum av upsa, sum skipini hava fingið eftir 5-6 døgum á fiskileið. Hetta er soleiðis ein lutfalsliga stuttur túrur hjá teimum. Rókur og Lerkur loystu í Saltangará 20. mars og í dag, nú tey eru inni aftur, er 26. mars.

Mánadagin væntar Landingarmiðstøðin Kongshavn, at fýra skip koma inn at landa. Tey eru Jaspis og Ametyst og Heykur og Falkur.

Á Kongshavn siga tey, at skipini lata illa at veiðini í løtuni.

Fyrr í vikuni vóru fleiri landingar í Saltangará.

Mánadagin vóru Polarhav og Stjørnan inni við sløkum 380.000 pundum og týsdagin Stelkur og Bakur við umleið 300.000 pundum.

Djúpvatnstrolarin Eydna var eisini inni týsdagin við 34.000 pundum. Teir partrola saman við Beinissvørði, men parið noyddist at bróta túrin av, tí okkurt riggaði ikki, sum tað skuldi.

Fyrst í hesi vikuni landaði eisini garnabáturin Oknin tilsamans 26.000 pund av svartkalva í Saltangará.

### Stokkut rokveiða

Í vetur hava partrolararnir yvirhøvur fingið minni upsa enn seinasta vetur og seinasta vár.

Herfyri vóru teir kortini í rættiligum upsaroki í nakrar dagar, men hetta vardi bara ov stutt. Góði fiskiskapurin minkaði aftur, og veiðan var sløk í nakrar dagar. Men síðan tók veiðan seg uppaftur seinasta vikuskiftið, men nú lata skipini, sum eru úti á fiskileiðunum, aftur illa at og siga, at veiðan yvirhøvur er lítil.

## Brestir og Venus landað í Sørvági

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Uppundir endan av hesi vikuni hava tvey skip landað í Sørvági.

Brestir var inni í gjár við umleið 60.000 pundum av kongafiski.

Á heimasíðuni hjá Jóannis Nielsen verður upplýst, at Brestir, sum hevur roynt vestanfyri, byrjaði túrin hin 20. mars.

Ætlandi loysti Brestir aftur í Sørvági í gjárkvøldið.

Línuskipið Venus hevur hendan túrin verið undir Íslandi, og sambært heimasíðuni hjá Jóannisi Nielsen vóru teir á Sørvági tíðliga í gjárkvøldið.

Venus, sum byrjaði túrin hin 14. mars, hevði umleið 100.000 pund, nú teir komu undan Íslandi.

Tað er Landingarmiðstøðin í Sørvági, sum landar og avgreiðir skip og bátar.



*Ein trolari og eitt línuskip hava landað í Sørvági nú uppundir endan av hesi vikuni Mynd: Jóannis Nielsen*

# Hýsa fekk góðan prís á Fiskamarknaðinum

**Prísirnir á hýsu vóru góðir við søluna á Fiskamarknaði Føroya í gjár, tá smáa hýsan fór fyri slakar 10 krónur fyri kilo og besta hýsan fyri 12,64 krónur**

FISKAPRÍSIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskamarknaður Føroya seldi í gjár 274 tons á uppboði. Størstu nøgdirnar vóru toskur, hýsa, longa, brosma, kongafiskur og havtaska.

Miðalprísurin fyri øll fiskasløgini samanlagt var 11,63 krónur fyri kilo. Tað er ein munandi lægri miðalprísur, enn besta sølan hesa vikuna, tá miðalprísurin nærkaðist teimum 19 krónunum fyri kilo.

Í gjár seldi Fiskamarknaður Føroya góð 88 tons av toski og 65 tons av hýsu.

Prísirnir fyri tosk vóru á leið teir somu, sum teir hava verið í eina tíð – úr 9,38 fyri tosk 4 upp í 17,88 krónur fyri kilo av toski 1.

Við søluna í gjár fekk hýsa góðan prís – og betri prís enn ein vanligan søludag á fiskamarknaðinum.

Miðalprísirnir fyri hýsu lógu úr sløkum 10 krónum fyri hýsu 4 upp í 12,64 krónur fyri kilo fyri bestu hýsuna.

Samlaða sølan fyri tey 274 tonsini á Fiskamarknaðin í gjár gav slakar 3,2 miljónir krónur.

*Hósdagur er góður søludagar fyri summi fiskasløg á Fiskamarknaði Føroya. Hetta kemst av, at fiskurin fæst av landinum pakkaður við Silver Fjord, sum siglir av Toftum hvønn mánadag og fríggjadag*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

